# Mentamálaráðið
YRKISDEPILIN

## SKRIVSTOVUFÓLK

**Starvið**
Fulltíðarstarv sum skrivstovufólk er leyst at søkja í Mentamálaráðnum.

Talan er um eitt áhugavert og fjølbroytt starv í Yrkisdeplinum við møguleikum fyri fakligari og persónligari menning við skiftandi uppgávum.

**Arbeiðsøki**
Í høvuðsheitum at arbeiða við øllum vanligum fyrisitingarligum uppgávum og at hava skrivligt og munnligt samskifti við viðskiftafólk, t.e. læupláss, lærlingar, yrkisskúlar, yrkisnevndir og onnur innan arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingarøkið.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum, at umsøkjari:
- Hevur handilsskúlaútbúgving og royndir í skrivstovuyrkinum ella aðra javnsetta útbúgving og royndir,
- hevur góðan teldukunnleika og kunnleika til mál, serliga føroyskt, og
- hevur góð samstarvsevni og førleika at arbeiða sjálvstøðugt.

**Lønar – og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.
Setanarøkið fevnir um alt stjórnarráðið og tess stovnar.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til:

Yrkisdepilin
Postrúm 3279
FO-110, Tórshavn

ella sum teldupostur til: peturoh@yrkisdepilin.fo

Umsóknir skulu vera Yrkisdeplinum í hendi í seinasta lagi 23. februar 2007, kl. 16.00.

Starvið verður at seta skjótast til ber.

Upplýsingar um virksemið hjá Yrkisdeplinum eru at finna á heimasíðuni: www.yrkisdepilin.fo

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, ber til at ringja til Petur Oluf Hansen, fyrisitingarleiðara, tlf. 555066.

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt fyrisitur ráðið uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

**Yrkisdepilin** er ein sjálvstøðug fyrisiting í Mentamálaráðnum, sum fyrisitur arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingarmál, herundir at vera fyrisiting hjá Yrkisútbúgvingarráðnum og yrkisnevndunum. Yrkisdepilin fyrisitur eisini ávís viðkomandi málsøki fyri Mentamálaráðið, herundir at avgreiða ferða- og lønarendurgjald til læupláss o.l.

TVØROYRAR KOMMUNA

## Søkt verður eftir dagrøktara

Dagrøktarskipanin í Tvøroyrar kommunu søkir eftir dagrøktara fyri dagrøktara sum fer í annað starv, at byrja 1. mars 2007

Vit ynskja, at tú:
- Hevur góðar umstøður at hava børn bæði inni og uttanfyri
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- Ert álítandi og hevur góð samstarvsevni
- Ert tolin og vísir umsorgan
- Hevur hegni og áhuga í at menna børnini
- Dugir at síggja møguleikar ístaðin fyri forðingar

Í dagrøktarskipanini starvast 17 dagrøktarar og ein leiðari. Talið av børnum í dagrøktini er 75

Ein dag um vikuna eru 3-4 dagrøktarmammur saman við børnunum í spælistovuni

Arbeiðstíðin er ímillum 7.30 - 17.15

Nærri fæst at vit um starvið við at ringja til tlf. 21 13 39 og tosa við Súsannu Poulsen

Vinarliga send umsókn tykkara til:

**TVØROYRAR KOMMUNU**
**Dagrøktarskipanin**
**800 Tvøroyri**

# VENJINGARSKÚLIN

Søkt verður eftir lærara frá **23. mars** og restina av skúlaárinum.

Talan er um 19 undirvísingartímar:

11 tímar í 3. flokki
ítrótt í 4., 5. og 8. flokki
handaverk og list í 3. flokki

*Dámar tær at undirvísa, hevur tú góð samstarvsevni, ert ágrýtin og engasjerað/ur í tínum virki, so er hetta kanska ein áhugaverd uppgáva hjá tær.*

Lønarbrotið er 0.79.
Løn eftir sáttmála við fíggjarmálaráðið.

*Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi **7. mars**.*

Meira fæst at vita um starvið við at ringja til skúlastjóran á tlf. 213502.

**Niels Nattestad**
skúlastjóri
Venjingarskúlin
handan Á 14

*Í Venjingareskúlanum eru í løtuni 450 næmingar, og her starvast 38 lærarar. Skúlin húsast í trimum bygningum: 1. og 2. fl. heldur til á Ytra skúla við Landavegin, 10. fl. er á Heimara skúla við Fr. Petersens gøtu og 3.-9. fl. eru í skúlanum handan Á*

## Felagið Tórshavn

**Aðalfundurin verður á Hotel Hafnia sunnudagin 25. februar kl. 15**

***við hesari skrá:***

a. Frásøgn nevndarinnar frá virki felagsins í farna ári
b. Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar
c. Fíggjarætlan fyri komandi ár
d. Val av nevndarlimum
e. Val av grannskoðara
f. Ásetan av limagjaldi
g. Frágreiðing og uppskot frá gongubólkinum
h. Innkomin mál:
Uppskot um, at felagið stílar fyri at gera uppskot um loysn av parkeringsviðurskiftum í Havn og kannar hvussu betrast kann um umstøðurnar hjá campistum, ið koma til Havnar
Ymiskt

Aftaná fundin sýna vit filmin ***"Undirhúsið á útferð"*** og dvd filmar um Føroyar.

*Møti fjøllment !*

**Felagið Tórshavn**
**Nevndin**

## Eysturoyar Røktar- og ellisheim

Søkt verður eftir ábyrgdarhavandi sjúkrarøktarfrøðingi í kvøldvakt at byrja sum skjótast ella eftir nærri avtalu

Arbeistíð: 0,7 tíð

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrarøktarfelag Føroya.

Umsókn saman við prógvi, viðmæli o.a. skal verða komið okkum í hendi innan **03.mars 2007.**

Nærri starvinum viðvíkjandi fæst at vita frá fyristøðumanninum tlf. 478200

Stórur dentur verður lagdur á, at trivnaður bæði fyri búfólk og starvsfólk framvegis eyðkennir heimið og vænta vit tí av tær, at tú hevur áhuga og gleði við, at samskifta við eldri fólk og at tú hevur vilja og egnileikar at samskifta við starvsfólk og avvarðandi.